LØGREGLUTÍÐINDI

*Lagt til rættis: Rigmar Dam, rigmor@sosialurin.fo*

# Gomul kona datt útí í kirkjutíð



Nakað av háva stóðst av einari hending við Vesturkirkjuna í Havn sunnudagin í kirkjutíð. Kirkjufólkið var illa við, tá tey vórðu órógvað av politistum, sum gingu og skimaðust inni í kirkjuni.

Av politistøðini verður sagt, at tey høvdu fingið boð um, at fólk høvdu sæð eina eldri kvinnu detta í hylin uttan fyri kirkjuna, men at tey funnu hava ikki aftur. Tí kom politiið á staðið at leita. Men meðan teir leitaðu í kirkjuni, hevði dóttir konuna funnið mammuna í hylinum, fingið hana upp á turt og koyrt hana heim. Tað vísti seg, at 86 ára gamla konan, sum býr á einum sambýli, var sloppin einsamøll í kirkju hendan sunnumorgunin, tá óhappið hendi.

## Ferðmátingar góvu úrslit

Um vikuskiftið hevur politiið verið úti á vegunum í Eysturoynni og Streymoynni og kannað ferðina hjá bilum. Tilsamans vóru átta mál við klippum í koyrikortið og onkur treytað frádømming eisini. Ongin bilførari varð tikin fyri at koyra við kenning.

## Dovið býarlív

Býarlívið var eisini ávirkað av ódnarveðrinum um vikuskifti. Fólk høvdu eftir øllum at døma ikki stóran hugin at ballast. Kortini var eitt harðskapsmál fráboðað, har tveir mans vóru komnir til hendurs í Klubbagarðinum náttina til sunnudag. Annar maðurin var handtikin fyri harðskap og avhoyringar verða nú gjørdar.

## Amboð stolin úr bili

Leygarkvøldið um 22.30 tíðina var ein løgin hending í gamla kommunuskúlagarði í Havn, har onkur hevur stolið amboð úr einum bili. Talan var um kostnaðarmikil amboð, eitt nú ein rundsag og borimaskina.



# Hvirlur tóku buss og bingju

Á alarmsentralinum hava tey havt úr at gera um vikuskiftið, eftir at ódnarveður við nógvum vindi, ælingi og tóruslátri hevur herjað um landið. Heili 23 fráboðanir um stormskaðar komu inn, tíbetur ongin mansskaði. Flestu skaðarnir vóru smámál um brotnir rútar, stakitt og tekjur, meðan tvær eitt sindur álvarsligari hendingar eisini fóru fram.

Annað var ein bussur, sum koppaði undir Gøtueiði. Bussurin var tómur og feyk av parkeringsplássinum og út á landsvegin. Á Norðasta Horni tók ein hvirla eina risastóra bingju, sum legði seg tvørtur um vegin til Velbastaðar. Fólk av brandstøðini vórðu boðsend at fáa bingjuna av vegnum aftur.

## Alarmsentralurin fór

Nakrir skaðar stóðust av toruslátrinum leygardagin. Eitt nú fór sendarin hjá Kringvarpinum, og sambandið við alarmsentralin reyk eisini. Av politistøðini verður sagt, at fólk kortini alla tíðina fingu fatur á hjálp, tí alarmsentralurin varð fluttur yvir á telefonina hjá politinum. Nú riggar 112 aftur.


